Kommunusamskipan Føroya

Føroya Løgting
Tinghúsvegur 1-3
Fo 100 Tórshavn

R. C. Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn
Telefon +298 302480
Telefaks +298 302481

Tórshavn 03.mai 2012

**Viðv. Tingmál nr. 169 "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd"**

Kommunusamskipan Føroya vil heita á løgtingslimir um at taka hoyringsskrivið hjá felagnum til eftirtektar og bíða við at broyta ásetingar í galdandi barnaverndarlóg, § 4 stk. 1 og 5.

Kommunusamskipan Føroya hevur í hoyringsskrivi og í Trivnaðarnevnd løgtingsins gjørt vart við, at tað bert fer at skapa óneyðugt órógv at broyta verandi økisbygnað, samstundis sum farið er undir eina tilgongd at broyta kommunubygnaðin og leggja eldraøkið út til kommunurnar.

Verandi 10 barnaverndarumsitingar eru sum heild vælvirkandi, og als einki talar fyri at átrokandi batar verða framdir við at minka talið av umsitingum niður í 7. Hinvegin hevði tað í øllum lutum verið skynsamt, at somu øki í framtíðini koma at umsita barnavernd, eldraøki og onnur tyngri málsøki.

Tí mælir KSF enn einaferð til, at møguligar broytingar ímun til krøvini um samstarvseindir í barnaverndarhøpi, eru í trá við tær broytingar, sum eftir ætlan verða framdar ímun til kommunal samstørv, í samband við at eldraøkið verður lagt út, og fram um alt, at hesar broytingar verða framdar samstundis.

Vinarliga
Vegna Kommunusamskipan Føroya

Gunvá við Keldu
Forkvinna

Eyðun Christiansen
Aðalskrivari